Lýsing eftir dagrøktara

Søkt verður eftir dagrøktara til kommunalu dagrøktina í Oyndarfjarðar kommunu at byrja tann 22. september 2003 ella skjótast eftir hetta.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Árna Joensen, borgarstjóra á telf. 444545 ella 223714.

Skrivligar umsóknir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 17. september 2003 kl. 16.00.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Oyndarfjørður, tann 05. september 2003

Oyndarfjarðar kommuna

Stigfjord 28 fót bátur til sølu

Ein Stigfjord bátur við fiskiloyvi verður hervið lýstur til sølu.

Báturin er bygdur í 1987 úr glasfipur, longd 28 fót, breidd 3,05 m. og dýpd 1,16 m.

Motorur: Volvo Penta 150 hk.

Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 5A fyri fult riknar útróðrarbátar undir 15 BRT, íalt 116 dagar.

Báturin er væl útgjørdur við Furuno ekkoloddi, Furuno radara, Cetrek plottara, VHF, radio, 4 snellum, Vágaspæli, egningartrakt o.ø.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

Bjørn á Heygum, adv.
Alfred Petersen, adv.
Tlf. 35 17 10

Toyota Landcruiser

árg. 11/96, koyrt 179.000 km, bláur v/ sportfelgum til sølu fyri 155.000 kr.

Tlf. 22 11 76

Til sølu

Volvo FL10 614 við vippu og krana.

Scania 142 trekkjari.

Honda Civic 1.8 Vetec 167 Hk við skaða.

Tlf. 21 17 32

Sosialurin -har tað hendir

Mentamálaráðið
Landsmiðstøðin

Lærugreina-ráðgevi/-ar

Starvið
Í Mentamálaráðnum/Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. november 2003 ella skjótast gjørligt.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um lærugreinina **føroyskt**, men eisini eitt nú um **heimstaðarlæru og skúlabyrjan**. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvrøgreinaligum høpi.

Samanlagt eru 10 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 1/2 fyrisitingartíma).

Førleikakrøv
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein og starvsøki, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta kt í ráðgevastarvinum.

Setanar- og lønartreytir
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

Umsókn
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu vera Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. september 2003.

Gjøllari upplýsingar fáast frá stjóranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

Mentamálaráðið og Landsmiðstøðin

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur ráðið uppgávur, ið viðvíkja kirkju. loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
Landsmiðstøðin er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri fakligum námsfrøðiligum skeiðum fyri lærarum og skúlamyndugleikum.

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

Bygningur hjá Hydro Tech PF til sølu

Um hóskandi boð fæst er framleiðslubygningurin hjá Hydro Tech á Eiði til sølu.

Samlaða gólvviddin er 1200 m² (30 x 40 m). Av hesum eru 200 m², í tveimum hæddum, nýtt til goymslu, skrivstovu, fundarhøli, umklæðingarhøli og matarhøli.
Í høllini eru monteraðir tveir 5 tons traverskranar. Arbeiðshæddin er 8 m.

Áhugað kunnu venda sær til Ólav Asafsson Olsen á skrivstovuni hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali, tlf. 444170 frá kl. 08.00 til 16.00, ella senda ein teldu post til: oao@kj-hydraulik.com

Bilur til sølu

Ein sera góður VW T4 bussur, 2.3 Diesel, frá feb. 1991 til sølu. Gev eitt boð.

Hans Jákup, tlf. 219848
ref@royal-consul.fo

Landsfelag Pensjónistanna

Ársveitslan hjá Landsfelag Pensjónistanna

verður hildin á Hotel Føroyum, leygardagin 4. oktober kl. 18.00. Kostnaður kr. 200,- pr. luttakara. Lutaseðlar blíva seldir.

Tey, sum ætla sær á veitsluna, skulu tekna seg hjá sínum lokalfelag í seinasta lagi 24. september.

Landsfelag Pensjónistanna

Lærarar til Hoyvíkar skúla

Søkt verður eftir lærara til restina av skúlaárinum 2003-2004 at undirvísa 16 tímar um vikuna.
Lærari, ið kann undirvísa í dreingjaítrótti, hevur fyrimun.

Søkt verður eftir lærara at undirvísa 27 tímar um vikuna fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Birgit Arge, skúlastjóra á telefon 315073

Umsóknir skulu sendast til:

Hoyvíkar skúla
Postrúm 3073
110 Tórshavn

Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga so ring og spyr eftir Jóhan B. Vilhelmsen ella skriva til:

Pf. Frants Restorff
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

Bakarasveinur

Okkum tørvar ein raskan bakarasvein. Hevur hetta tín áhuga so ring og spyr eftir Jóhan B. Vilhelmsen ella skriva til:

Pf. Frants Restorff
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

Prófskeið á Fróðskaparsetrinum

Nøkur pláss eru eftir til prófskeið í Føroyskum.

Heilt fá pláss eru eftir til Cambridge skeiðini Advanced english og Prificiency in English.

Umsóknarbløð fáast á Setursskrivstovuni, tlf. 352500 ella á www.setur.fo

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
Postsmoga 272
110 Tórshavn

Ætlar tú at ættleiða eitt barn?

Kom so á kunningarfund hjá tí danska ættleiðingarstovninum AC International Børnehjælp, sum fyrr kallaðist Adoption Center

leygardagin 27. september kl. 13.00
á Hotel Hafnia

Fundurin tekur umleið 3-4 tímar.

Á fundinum fæst tú at vita um
- Adoptiónsprocessina frá A-Z
- Kunning um tey lond, børnini koma frá
- Kunning um børnini
- Frágreiðing um AC International Børnhjælp

Á fundinum luttaka leiðarin Jørgen-Ulrich Raunskov og nevndarlimurin Asger Thomsen. Tú fært høvi til at seta spurningar, sum ofa stinga seg upp í samband við ættleiðing.

Fundurin er ókeypis, men tað er neyðugt at boða frá luttøku. Við fráboðan fært tú meira at vita frá Kirstin Andersen á tlf. 0045 86204843 ella á t-post: ka@a-c.dk

Tú kanst lesa meira um ættleiðing á www.a-c.dk

Hús í Klaksvík til sølu

Ognin á krossinum Dávabrekka 8/Kjalarvegur til sølu um hóskandi boð fæst:

Matr. nr.	1293
Grundøki:	255 m²
Húsini:	Ca: 96 m² í tveimum hæddum. Bygd ca. 1948, tilbygningur ca. 1980.

Húsini sum eru gjørd úr betong og klædd við timbur, hava útsýnið yvir alla Klaksvíkina.

Áhugað kunnu ringja 457791, best eftir kl. 10

Lærari

Søkt verður eftir lærara til Fuglafjarðar skúla at byrja umleið 15. oktober. Starvið er fyri lærara, sum hevur barnsburðarfarloyvi í umleið 28 vikur.

Tímatalva

2. b. fl. 13 t/v	kr., fø., til., heimst., ítr. Og flokslærari
1., 8. og 10. fl. 5 t/v	ítróttur
8 t/v	serligan tørv

Starvið verður lønt samb. galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir saman við ljósriti av prófskjølum o.ø. verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi fríggjadagin 19. september kl. 16.00.

Skúlastýrið f. Fuglafjarðar skúla
Uni Næs, formaður
FO-530 Fuglafjørður